# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Hákun prinsur vitjaði oljumessu

**Á føroyska básinum á ONS stevnuni í Stavanger í gjár fingu tey gongaliga vitjan**

ONS
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í gjár byrjaði stóra Offshore Northern Seas stevnan, ONS 2008, og har fingu føroyingarnir, sum eru á stevnuni, forkunnuga vitjan, tí sjálvur norski krúnprinsurin, Haakun prinsur vitjaði føroyska básin.

Á stevnuni eru fimtan føroyskar fyritøkur, og tað eru Oljuvinnufelagið og Samvit, sum samskipa føroysku luttøkuna.

Við á stevnuni eru eisini fleiri politikarar, eitt nú borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, varaborgarstjórin, Jan Christiansen og borgarstjórin í Runavíkar kommunum, Hans Jákup Lamhauge. Eisini Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í tilfeingismálum er á stevnuni.

Sum partur av ONS verður skipað fyri festivali á bryggjuni í Stavanger. Her fer eitt nú Westward Ho at liggja – beint yvir av tjaldinum, sum Tórshavnar Kommuna hevur sett upp. Tjaldið saman við sluppini fara at vera karmur um føroyska mentan, mat og tónleik. Harafturat skipa Tórshavnar Kommuna og Runavíkar kommuna saman við fyritøkunum á landabásinum fyri móttøku umborð á Westward Ho mikudagin.

Samlaða framsýningarøkið á ONS 2008 er 17.500 fermetrar í 10 hallum. Føroyski básurin er 60 fermetrar til støddar, og er hetta væl størri enn á ONS 2006. Í 2006 vitjaðu næstan 40.000 fólk framsýningina og fyriskipararnir aftanfyri framsýningina vænta, at framsýningin í ár verður enn størri.


*Leif Johan Sevdal, borgarstjóri í Stavanger, Heðin Mortensen, Kjell Ursin Schmith, forseti fyri ONS, Hákun Prinsur og Lars Takla, nevndarformaður á ONS vitja føroyska básin á oljuráðstevnuni í Stavanger*


*Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, konan Hjørdis Mortensen, Hans Jákup Lamhauge, borgarstjóri í Runavík, konan Davina Lamhauge og Jan Christiansen, varaborgarstjóri í Havn*

## FAKTA

**Føroysku fyritøkurnar á ONS 2008 eru:**
Atlantic Airways, Atlantic Supply Base, Beras, Bitland, Faroe Petroleum, Faroe Ship, Føroya Tele, Keel Solution, Simprentis, Shefa, Skipasmiðjan, Supply Service, Virkisráðgeving, Runavíkar Havn og Tórshavnar Havn.

## FAKTA um Hákun Prins

Haakon Magnus av Norge – Hákun Prinsur, er føddur 20. juli í 1973. Hann er norskur krúnprinsur. Er sonur og næst elsta barn Harald Kong V og Sonju drotning. Hann hevur eina eldri systur, Martha Louise. Hákun prinsur er abbasonur Ólav kong V og langabbasonur Haakon VII kong. Haakun Magnus er giftur við hennara kongaligu hátign, Metta-Marit. Hann umboðar 4. ættarlig í norska kongshúsinum.

## Tommy stjóri á FAS og Skrásetingini

Tommy Petersen er 59 ára gamal og útbúgvin juristur. Hann hevur drúgvar royndir sum ráðgevi í almennari fyrisiting og sum stjóri á almennum stovnum. Harumframt hevur Tommy Petersen altjóða royndir bæði sum ráðgevi fyri DANIDA og føroyskur samráðingarleiðari mótvegis ES. Endamálið við nýggja stovninum er at veita føroysku vinnuni góðar vinnulógarkarmar. Harumframt er uppgávan at skipa FAS sum eina kappingaføra altjóða dygdar-skipaskrá, soleiðis at sjóvinnan og avleitt virksemi í hesum sambandi kann gerast ein týðandi vinnugrein í Føroyum.


*Tommy Petersen*